# Eitt hart slag fyri dóttrina

**Nena Thomsen, sum eigur 16 ára gomlum seinmentu Jenny, stúrir fyri framtíðini hjá gentuni, sum ikki longur fær ergoterapi. - Eg tori ikki at hugsa um, hvussu stór afturstiginі eru**

Randi Jacobsen

Tá ið Nena Thomsen mikudagin í seinstu viku við dóttrini Jenny var hjá Beintu Lassen, sum nú í 10 ár hevur givið gentuni ergoterapi-viðgerðir, var hetta seinastu ferð.

Nena veit hvørki út ella inn, hvat hon skal gera.

- Eg havi ofta hugsað um, at familjur við børnum, sum hava serligan tørv, ikki kunnu búgva her. Vit hava eisini onkuntíð tosað um at flutt til Danmarkar, men tað hevði hóast alt verið stór synd at gjørt móti Jenny, sum er so góð við skyldfólk síni og dámar væl at koma út á bygd, sigur Nena.

Dóttirin er seinment og hevur ein feril av autismu. Hetta hevur við sær, at hon er nokkso afturlatin.

Í 10 ár hevur hon fingið viðgerð hjá Beintu Lassen.

### Lærdi at tosa

- Tað hevur havt stóran týdning fyri hana bæði sálarliga likamliga og ikki minst málsliga, sigur Nena.

Jenny, sum nú er 16 ára gomul, fekk fyri 10 árum síðan at vita frá Beintu, at vøddarnir í andlitinum vóru ov veikir, og tá ið hon eina tíð hevði gingið til viðgerð, byrjaði hon at tosa. Tað skuldi til.

> **Hevur tú ilt í rygginum, vísir kommunulæknin til fysioterapeut. Hví kann hann ikki eisini gera tað til ergoterapeut**

Viðhvørt hevur Jenny ikki fingið viðgerð í nakrar vikur. Tað hevur verið, tá ið tey hava verið burturi, summarferia hevur verið o.a.

- Tá hava vit upplivað hvørja ferð, at hon er steðgað og hevur bakkað aftur, men so skjótt hon er komin í viðgerð aftur, hevur gingið betur aftur, sigur Nena.

Dóttirin Jenny gekk í sínari tíð í barnagarði sum onnur børn, og hon hevði stuðul. Eina ferð var Beinta Lassen har og greiddi frá um, hvussu ergoterapi kann hjálpa børnum við serligum tørvi, og stuðulin greiddi Nenu frá hesum.

### Almannastoavn rindaði

- Eg fór til kommunulæknan og fekk ávísing til ergoterapi. Ta fyrstu tíðina var trupult at koma ígjøgnum hjá Almannastovuni. Vit rindaðu tí sjálv, við tað at vit sóu, hvussu væl hetta hjálpti. Umsíðir fingu vit stuðul, sigur Nena.

Jenny gekk í barnagarði, til hon var níggju ára gomul. Ta fyrstu tíðina fingu tey játtan fyri eitt ár í senn, meðan seinni fingu tey játtan fyri trý ár í senn. Tann seinasta játtanin gongur fram til 2012, men hon verður so ikki brúkt meira nú.

- Eg havi billað mær inn, at Føroyar eru eitt framkomið land, og at Jenny tí fór at halda fram við at fáa ergoterapi. Men nei. Eg eri púra ráðaleys. Hvat skulu vit gera? spyr Nena, sum hugsar nógv um framtíðina hjá dóttrini.

### Hvat skulu vit gera?

Aksel V. Johannesen hevur mælt til, at bara ein barnalækni skal kunna ávísa børn til ergoterapi. Men barnalæknin hevur einki at gera við børn yvir 15 ár. Hvat so við Jenny.

- Hetta er ikki nakað, sum krevur ávísing frá serlækna. Tað hevði verið ruddiligast fyri allar partar, at kommunulæknar ávístu. Hevur tú ilt í rygginum, vísir kommunulæknin til fysioterapeut. Hví kann hann ikki eisini gera tað til ergoterapeut. Tað er tað sama, sigur Nena.

Hon kundi hugsað sær ein kjakfund millum foreldur, ergoterapeutar og landsstýrismannin, men hon veit ikki, hvørja orku foreldur hava til at stríðast. Harafturat heldur hon tað vera niðurgerandi sum foreldur at skula stíga fram.

- Mín stríðsorka er eisini avmarkað, tí eg havi arbeiði og trý børn yngri enn Jenny. Ikki fyri tað, tey stimbra eisini systrina væl, sigur Nena.



*Nena Thomsen er mamma at 16 ára gomlu gentuni Jenny. Mamman stúrir fyri framtíðini hjá gentuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Tosar móti betri vitandi

Randi Jacobsen

Í farnu viku kom Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður bæði í Kringvarpinum og í Rás 2 við nøkrum viðmerkingum til, at eingin sáttmáli er millum Ergoterapeutfelagið og heilsutrygd.

Hann segði m.a., at tað almenna fer at koma við einum betri og biligari tilboði við ergoterapi.

- Kundi hugsað mær neyvari greining av, hvussu hetta tilboðið skal verða betri. Eru tað dugnaligari starvsfólk? Betri útgerð. Fleiri viðgerðartímar til tað einstaka barnið? Betri útbúgving av ergoterapeutum, ella hvat er tað, sum gera tað betri? spyr Beinta Lassen.

Sum ánari og leiðari av ergoterapistovuni Ergo letur hon heilsa landsstýrismanninum, at hann skal leita leingi og djúpt eftir at finna betri og dugnaligari ergoterapeutum enn teimum, sum hava starvast hjá Ergo.

- At hann so tosar um vandan fyri feilmetan av diagnosu, yvirviðgerð og møguleiga skeivari viðgerð, er sera langt úti, og taka vit hetta sum eina ógvliga grova ákæru, sigur Beinta Lassen.

Hon finnur seg heldur ikki í at verða umrødd sum ein, ið hevur slanguna í landskassanum.

Beinta Lassen skilir væl sjónarmiðið, at veitarin og ánarin í summum førum eru sama fyritøka. Hinvegin hava hvørki foreldur, kommunulæknar ella málsviðgerðar á Almannastovuni áhuga í at laa børn vera ov leingi í viðgerð.

Aksel V. Johannesen hevur sagt, at tað almenna fer at kunna veita viðgerð fyri 150 krónur um tíman. Privati viðgerðartímin hevur kostað 475 krónur um tíman. Beinta Lassen trýr einki uppá, at tað almenna kann veita ergoterapi fyri so lítla upphædd.

- Eisini legði Aksel V. Johannesen ergoterapeutar undir at oyðsla skattakrónur burtur til óneyðugar venjingar, sum eftir hansara meting var ábyrgdin hjá foreldrunum. Hetta er ein sera álvarsom ákæra móti bæði ergoterapeutum og foreldrum og sigur ikki so lítið um hansara vantandi innlit og virðing fyri ergoterapeutiska fakinum, sigur Beinta Lassen.